## ÚT AT KOYRA

# Rúsdrekka og ferðsla kunnu aldri sameinast

FERÐSLUTRYGD

Nógvar ferðsluvanlukkur í Svøríki standast av rúsdrekkaávum. Árini 1994-1995 vóru umleið 20 prosent av teimum bilførarum, sum doyðu í ferðsluvanlukkum, ávirkaðir av rúsdrekka. Í einstaklings vanlukkum er annarhvør bilførari ávirkaður.



*Sum hendan myndin vísir á, kunnu rúsdrekka og ferðsla aldri sameinast*



*Í einstaklings vanlukkum í Svøríki er annarhvør bilførari ávirkaður*

# Infrareytt ljós til koyring í myrkri



*Sum ískoyti til nærljósini verða tær ósjónligu infrareyðu strálurnar endurspeglaðar á einum skýggja inni í bilinum*

**Sambært Hella lyktaverksmiðjuni henda 40 prosent av vanlukkunum, har fólk doyggja í ferðsluni, í myrkrið, hóast einans 20 prosent av ferðsluni er í hesum tíðarskeiði á samdøgrinum**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Á kendu lyktaverksmiðjani, Hella, verður arbeitt við gera forlyktir við infrareyðum ljósi, fyri at økja um ferðslutrygdina, tá koyrt verður í myrkrið. Tað tryggasta hevði verið, um vit altíð koyrdu við fjarljósum, men tað ber einans til í 5 prosentum av tíðini ið koyrt verður.

### Upplýsa vegin ósjónliga

Infrareyðu forlyktirnar upplýsa vegin ósjónliga 200 metrar fram. Tað ósjónliga endurspeglandi ljósið, saman við teimum vanligu lyktunum, verður loftað av einum infrareyðum kamera, ið endurgevur myndina á einum skýggja inni í bilinum. Bilførarin skal venja seg við, at skýggin vísir tað ósjónliga strekkið heilt upp til 200 metrar frammanfyri bilin, men tað roynist sera væl.

*Kelda: FDM / Motor*

# Ringspeed Presto – kann leingast ella styttast eftir tørvi


*Her er Rinspeed Presto toygdur til at hava sitipláss til fýra ferðandi*

**Á bilaframsýningini, Gèneve Motorshow, ið verður í komandi mánaði, kemur designfyritøkan Ringspeed at hava ein bil, ið kann leingjast ella styttast eins og ein barnasong fyrr í tíðini**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Talan er so avgjørt eina spennandi verkætlan, ið designfyritøkan Ringspeed sýnir fram í Gèneve. Bilurin, ið teir kalla Presto, kann nýtast sum býbilur, til tvey ferðandi, ið er lættur at parkera í býnum, ella hann kann hava fýra sitipláss, um tørvur er á tí. Tað tekur bert nøkur fá sekund at stytta ella leingja bilin teir 75 cm, ið er munurin millum styttsta og longsta mát.


*Kelda: FDM / Motor*

*Til ein býtúr í nógvari ferðslu kann bilurin eftir fáum sekundum gerast um til ein stuttan 2 persónabil. Leggið til merkis at bilurin hevur ongar hurðar*




## Aðalfundur

Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður **leygardagin 2. mars 2002 kl. 13.00 í Havnar Klubba.**

**Skrá:**
1. Frásøgn formansins frá
   a) farna ári og
   b) virki felagsins framyvir.
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar.
3. Lógarbroytingar
4. Møgulig uppskot frá limum og nevnd.
5. Ásetan av limagjøldum.
6. Val av formanni.
7. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum.
8. Val av roknskapargrannskoðara og tiltakslimi.
9. Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 23. februar 2002.**

Uppskot til formann felagsins er:
**Gunnleivur Dalsgarð**
**Varðabú 32**
**100 Tórshavn**

**STARVSMANNAFELAGIÐ**

## Aðalfundur

Ársaðalfundur í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins verður beint eftir aðalfundin Starvsmannafelagsins í Havnar Klubba 2. mars 2002.

**Skrá:**
1. Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársrokniskapi til góðkenningar.
3. Val av nevndarlimum.
4. Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 23. februar 2002.**

**Nevndin**

**Mentamálastýrið**
*Mentamáladeildin*

### Stuðul til mentanarlig tiltøk

Á fíggjarløgtingslógini er peningur settur av til stuðul til ymisk mentanarlig og listarlig tiltøk, mentanarligar verkætlanir og tiltøk innan- sum uttanlands.

Játtanin er ætlað at birta upp undir og stuðla einum virknum og mennandi mentanarlívi á bygd og í býi, at flyta fram og gera føroyska mentan og list sjónligari innan- og uttanlands, og at geva stuðul til føroyskar verkætlanir, ið lutvíst verða fíggjaðar við stuðli frá Norðurlendska Ráðharrastovninum, Norðurlendska Mentanargrunninum ella stovnum og nevndum undir Norðurlendska Ráðharrastovninum. Stuðul kann eisini veitast einstaklingum til nýskapandi listarlig ella mentanarlig tiltøk, verkætlanarfyrireiking og annað listarligt virksemi.

Áhugað eru vælkomin at søkja.

### Stuðul til barna- og ungdómsarbeiði

Tann upphædd, ið Mentamálastýrið umvegis sp/f Ítróttarvedding fær burturav veddingarpeninginum, verður at nýta til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung.

Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum eru børnum ella ungum til gagns, eru vælkomin at søkja.

### Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari

Á fíggjarløgtingslógini 2002 er peningur settur av til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari.

Tey, ið arbeiða við ella ætla at fara undir at framleiða føroyskt loftmiðlatilfar, eru vælkomin at søkja.

### Stuðul til listafólk

Peningur er settur av á fíggjarløgtingslógini 2002 til stuðul fyri listafólk. Listafólk sum eru undir útbúgving kunnu søkja. Yrkislistafólk kunnu søkja um stuðul til eftirútbúgving og til námsferðir.

Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á internetinum á: *www.mms.fo*, ella fáast við at venda sær til:

**Mentamálastýrið**
**Postrúm 3279 – 110 Tórshavn**
**Telefon 35 50 50 – Telefax 35 50 55**
**e-postur.: mms@mms.fo**

Umsóknirnar skulu verða Mentamálastýrinum í hendi innan **hósdagin 15. mars 2002**. Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Mentamálastýrið á telefon 355050.

Havnar SJÚKRAKASSI

## Umboðsval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val hósdagin 21. mars 2002.

4 umboð í Tórshavnar valdømi og 1 umboð í Nólsoyar valdømi eru upp á val.

Uppskot til umboð skulu skrivliga verða sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 7. mars 2002.

**Havnar Sjúkrakassi**
11. februar 2002

## Bilsmiðjulærlingur søkist

Søkt verður eftir lærlingi til mekaniska verkstað okkara.

Ert tú ágrýtin við áræði og hevur hug til útbúgving innan bilhandverkið, so ert tú møguliga tann, ið vit leita eftir.

Vit bjóða tær lærutíð á sera framkomnum verkstaði við øllum nútímans hentleikum og góðum arbeiðsumhvørvi.

Hevur tú 10. floks prógv fólkaskúlans og/ella SIT-prógv og helst koyrikort – so send okkum skrivliga umsókn sum skjótast.

Ford
**P/f Wenzel – Ford í Føroyum**
Akranesgøta 5 - 100 Tórshavn
Att. Anthonius Dalsgaard, verkførari

## Haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum,

**sum ikki fáa leygardagsbløðini, verða biðin um at ringja tlf. 253497 leygardag millum kl. 11 og 14**

**Prentmiðstøðin**

veitst tú ikki tað?

Sosialurin